# Ráðgevar

Landsmiðstøðin sóknast eftir tveimum ráðgevum. Størvini verða at seta 1. august 2007.

## Lærugreinaráðgevi

**Starvið**
Í Landsmiðstøðini er eitt starv sum lærugreinaráðgevi leyst at seta frá 1. august 2007.

Starvið fevnir í høvuðsheitum um ráðgeving í lærugreinunum landalæru, søgu og samtíð og er 6 lønartímar um vikuna. Ein lønartími er umleið 1,6 fyrisitingartímar.

**Starvslýsing**
Ein starvslýsing er galdandi fyri ráðgevastarvið. Eitt nú verður sagt:

- Ráðgevin skal í øllum lutum virka fyri einari fakligari og námsligari menning í skúlanum
- Ráðgevin skal støðugt halda seg kunnugan við ta menning, sum er á námsliga, fakliga og tøkniliga økinum
- Ráðgevin skal ráðgeva viðvíkjandi undirvísingarmiðlum og arbeiðshættum í einstøku lærugreinunum.

Lagt verður upp til eitt skipað samstarv millum ráðgevarnar - møguliga í tvørgreinaligum bólkum og í toymum.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett eftir avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og lønt í lønarflokki 30.3.

Setanartíðin er í fyrstu atløgu 3 ár, har fyrsta árið er eitt royndarár. Síðani kann setanartíðin verða longd. Um serlig viðurskifti tala fyri hesum, kann setanartíðin leingjast út yvir 7 ár.

## Námsráðgevi

**Starvið**
Í Landsmiðstøðini er eitt starv sum námsráðgevi leyst at seta frá 1. august 2007.

Starvið fevnir í høvuðsheitum um námsfrøðiligt arbeiði innan fólkaskúlan, men virkisøkið er alt skúlaverkið.

Ráðgevin skal vera við í og samskipa skeið og eftirútbúgving av lærarum, skal ráðgeva í sambandi við menningarvirksemi í skúlanum og í samstarvi við aðrar ráðgevar í Landsmiðstøðini virka fyri einari námsligari og fakligari menning í skúlanum.

Ráðgevin skal harumframt ráðgeva viðvíkjandi undirvísingarmiðlum og í ymsum arbeiðshættum og skal luttaka í ymsum verkætlanum - serliga á tí námsfrøðiliga økinum og innan KT.

Ráðgevin skal tryggja, at ymsu uppgávurnar verða loystar á einum høgum fakligum stigi.

Tann, ið sett/-ur verður, hevur skyldu til, eftir ynski stjórans, at taka lut í øðrum arbeiði í Landsmiðstøðini.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Setanartíðin er í fyrstu atløgu 3 ár, har fyrsta árið er eitt royndarár. Síðani kann setanartíðin verða longd. Um serlig viðurskifti tala fyri hesum, kann setanartíðin leingjast út yvir 7 ár.

Arbeiðstíðin í ráðgevastarvinum er 0,45 av fullari arbeiðstíð. Tann, ið settur verður, skal undirvísa írestandi tímarnar í skúlanum.

## Felags fyri bæði størvini

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at umsøkjari

- hevur læraraútbúgving og/ella aðra hægri námsfrøðiliga útbúgving
- hevur hollan ástøðiligan kunnleika og góðar starvsligar royndir
- hevur áhuga fyri námsfrøðiligum arbeiði og fyri nýtslu av KT í undirvísingarhøpi
- hevur góð samstarvsevni og evni at samskipa
- hevur førleika at menna samstarvið við starvsfelagar, stovnar og lærarar
- verður ein virkin partur av toymisumhvørvinum í Landsmiðstøðini og samstundis kann arbeiða sjálvstøðugt
- hevur áhuga fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggjar leiðir.

**Vit bjóða**

- eitt spennandi starv við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti við lærarar, skúlar og skúlamyndugleikar
- arbeiði á einum høgum fakligum stigi og góðar møguleikar fyri bæði persónligari og fakligari menning.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø. skulu sendast til:
Landsmiðstøðin
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3084
FO-110 Tórshavn
ella t-post: lms@lms.fo

Umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 20. juni 2007.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Petur Simonsen, stjóra í Landsmiðstøðini, tlf. 356850.

www.lms@lms.fo

Landsmiðstøðin LMS

**Landsmiðstøðin** er stovnur undir Mentamálaráðnum, sum veitir tænastur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingarmiðlar, veitir fakliga og námsliga ráðgeving, skipar fyri eftirútbúgving av lærarum og hevur námsligan verkstað.

---

SEV

# Skrivstovufólk
## søkist til Elfelagið SEV

**Eitt starv sum skrivstovufólk á skrivstovuni hjá SEV í Havn er leyst at søkja.**

**Starvið:**
Arbeiðstíðin er mánadag til hósdag kl. 1000 til 1615 og fríggjadag kl. 1000 til 1515. Mattíðin er 30 min. um dagin, men kann longd mattíð avtalast móti at møta fyrr á degi.

Starvið umfatar fyrst og fremst at passa telefonvekslaraskipan okkara, men skal viðkomandi rokna við eisini at skula røkja aðrar uppgávur, ið hoyra skrivstovuni til.

**Førleikakrøv:**
Starvið krevur ikki nakra formliga yrkisútbúgving, men við tað, at SEV hevur í ávísan mun samskifti við útheimin, er neyðugt at kunna samskifta á skandinaviskum og enskum.

**Lønin:**
Starvið er lønt sambært sáttmála millum SEV og Starvsmannafelagið alt eftir útbúgving og starvsroyndum. Starvið er roknað til umleið 79% av fulltíðarstarvið, og verður lønin sett eftir hesum.

**Upplýsingar um starvið:**
Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til John P. Danielsen, deildarstjóra á tlf. 346800.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við møguligum prógvum og ummælum skulu sendast Elfelagnum SEV, Box 319, 110 Tórshavn, og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi mikudagin, tann 27. juni 2007.

---

SJÓVAR KOMMUNA

## ENDURLÝSING

## Søkt verður eftir stuðulsfólki at byrja 1. juli

Starvið er avloysarastarv fyri stuðulsfólk í barsilsfarloyvi.

Arbeiðstíðin er 24,5 tímar um vikuna.

Løn samb. sáttmála við Føroya Pedagogfelag.

Umsókn við møguligum viðmælum skulu verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 18. juni 2007.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til kommunuskrivstovuna Tlf. 47 27 27

**SJÓVAR KOMMUNA**
SKÚLAVEGUR 10
490 STRENDUR

---

Sosialurin